# ta kunningar- og samskiftistøkni



*Olav Enomoto: vit mangla fyrimyndir í føroyskari KT-vinnu*



*Bill Justinussen: Tað kann gerast ein koddi hjá fyritøkum at servisera landinum og tí sovna á tryggu inntøkunum.*



*Kári P. Højgaard: Innan KT noyðist tú at renna fyri at standa í stað*

úr hesi orku, so eru vit komin langt.

Tórbjørn Jacobsen vísir á Ísland, har hava tey gjørt vakstrarhús innan KT vinnu, har verkætlanir og hugskot verða ment, og tað er á hendan hátt vit mugu hugsa.

Olav Enomoto sigur, at til ber, við lóggávu at broyta fyritreytirnar hjá føroysku virkjunum, t.d. hevur Malta givið virkjum loyvið, at skipa fyri gambling á alnetinum, og hetta gevur landinum stórar inntøkur. Men eisini við nýhugsan innan skattaskipanina kunnu vit skapa møguleikar, sigur hann. Bjarni Djurholm nevnir innan hetta økið, møguleikan hjá virkjum at gjalda breiðband til starvsfólkið, uttan at hetta verður skattað, sum ein áhugaverdan tanka.

## Mangla fyrimyndir

Olav Enomoto heldur at vit mangla fyrimyndir í føroyskari KT-vinnu, einki føroyskt virki hevur veruliga gjørt vart við seg innan KT ídnaðin. Hyggja vit t.d., at Skype, ið ein ungur dani var við til at skapa, so gjørdist eitt einfalt hugskot til eina av teimum heilt stóru KT-fyritøkunum uppá stutta tíð. Vit mangla tílíkar fyrimyndir, ið vísa, at eisini vit kunnu skapa successir. Tá vit hava successir eru vit alt ov lítið dugnalig til at vísa á tær. Her vísir hann á, at Formula hava gjørt Invoice Workflow skipanina, ið er blástemplað av Microsoft, men vit duga ikki nóg væl at vísa á hetta, sum eina fyrimynd.

## Landið kann vísa vegin

Bjarni Djurholm vísir á menningina av talgildari undirskrift, sum eitt dømið har landið, í samstarvi við eitt føroyskt virki, fer inn og rindar fyri menningina av eini skipan, ið landið skal brúka, men sum samstundis ger virkið kappingarført uttanlanda. Her er tðdningarmikið, at vit ikki gera alt ov serføroyskt, men at vinnan skilir, at hon er í kapping við umheimin. Bill Justinussen nevnir samstarvið millum fíggjarmálaráðið og Atlantstøkni, sum dømi um væleydnað arbeiðið, har eitt føroyskt virkið mennir eina skipan til landið, ið kann brúkast uttanlanda. Hann setur hetta upp ímóti, teimum upplivingum, ið hann hevði við at gera eina heilsuskipan í heilsumálaráðnum, har ein føroysk fyritøka var umboð fyri eina danska skipan. Hesin arbeiðsháttur kann gerast ein koddi, har fyritøkurnar servisera landinum og tí sovna á tryggu inntøkunum.

Tórbjørn Jacobsen greiðir frá, at í fjør kom fram, at Landið brúkar umleið 80 milliónir til KT um árið, men hetta fer í stóran mun til at keypa teldur og útlendskar skipanir og til at pjøssast um tær, sigur hann. Um man ístaðin royndi, at lata føroyskar veitarar sleppa inn, at standa fyri allari talgildingini av umsitingini, so kundi menningin gjørt, at føroyingar kundu gjørst kappingarførir innan KT, og møguliga kundi man skapt ein útflutning. Hann er greiður yvir, at hetta kann tulkast sum ígongdsetarastuðul, men leggur satt at siga ikki so nógv í tað. Tí, at tosa um KT ídna sum nú er, er sum Jesias profetur segði á sinnið at fáa runnar at grógva upp úr turrari jørð.

Sum dømi um skeivu gongdina nevnir Tórbjørn teldukervið á landsjúkrahúsinum. Har man fór til ein danskan veitara fram um allar føroysku, tí henda skipan skuldi verað so trygg, hetta er tað sama, sum at siga, at føroysku skipanirnar ikki eru nóg tryggar.

Olav Enomoto nevnir talgildu undirskriftina, og ætlanirnar um at gera alt størri part av almennu tænastunum talgildar, sum økið har landið fer inn og skapar møguleikar fyri vinnuni. Eisini Bjarni Djurholm sær talgildan av almennum tænastum, sum eitt neyðugt og gott stig, ið vinnumálaráðið ynskir at ganga á odda við.

## Stovnarnir eru av gamla slagnum

Bæði Henrik Old og Olav Enomoto nevna vanahugsan og stirvnar stovnar, sum forðing fyri menning. Henrik Old heldur, at t.d. menningarstovan og fjarskiftiseftirlitið tykjast tung at dansa við. Olav Enomoto heldur, at bæði peningastovnar og Menningarstovan eru stovnar av gamla slagnum, og tað tí er ringt hjá nýggjum og virkisfýsnum KT fyritøkum at sleppa ígjøgnum við sínum hugskotum. Henrik Old sigur, at trupulleikin ikki bert fevnir um KT ídnaðin, men um ein stóran trupulleika við at gagnnýta fólk við evnunum at bróta upp úr nøggjum. Fólk í hava góð hugskot, enda við at brúka alt ov nógva orku til at framleiða hugskotini, ístaðin fyri at koma við nøggjum hugskotum. Her noyðast hugsanir at verða fluttar og kanska eisini fólk, sigur Henrik Old.

## Fiskivinnan er ein møguleiki

Olavi Enomoto metir ,at kanska 90% av fíggjarorkuni liggja í fiskivinnuni. Vit hava sera nógva vitan innan fiskivinnu, tí er upplagt at gera KT-vinnu, ið liggur tætt uppat fiskivinnuni, hann er væl greiður yvir, at hetta er sagt 1000 ferðir uttan úrslit, og hann heldur, at hetta er, tí fiskivinnan er bæði skeptisk og illoyal yvir fyri KT-vinnuni. T.d. hava øll skip radarar, hví verður einki gjørt innanfyri hetta økið, spyr hann?

Henrik Old ivast ikki í, at hetta er eitt øki har føroyingar veruliga kundu gjørt um seg. Tí bæði innan trollemmarnar í Suðuroynni og innqn hjá amboð hjá vónini Vónini hava vit víst, at vit duga væl, at menna amboð til fiskivinnuna. Men hann viðgongur samstundis, at fiskivinnan er øgiliga konservativ, og at allar broytingar koma av neyð.

Tórbjørn Jacobsen sigur sum er, at hann ikki hevur nóg gott innlit í hetta mál til at vita, hvørjir møguleikar eru í at menna KT til fiskivinnuna í Føroyum, men hann heldur, at hetta ljóðar sum ein gongd leið.

## Føroyar sum royndarøki

Bitland roynir at bjóða Føroyar framsum KT royndarøki fyri útlendskar fyritøkur. Bill Justinussen heldur, at arbeiðið hjá Bitlandi sær áhugavert út, men veit ikki rættiliga, í hvønn mun hetta fer at virka mennandi fyri føroyska KT vinnu. Gransking er ofta so detaljuorientera, sigur hann. Granskarin fer inn í sína egnu verð, og spurningurin er, um hvussu nógv vit læra av hesum.

Eisini Henrik Old er sera spentur um ætlanirnar hjá Bitlandi og sigur, at Føroyar í sini serligu geografisku støðu eru upplagdar til tílíka gransking. Hann ivast ikki í, at her liggja øgiligir møguleikar. Hetta er Tórbjørn Jacobsen samdur í, og hann heldur, at hetta er sjálvandi eitt øki, man eigur at troyta. Hann vónar, at granskingin kann skapa eina synergi effekt hjá føroyskum virkjum, ið fáast við sama øki. Eisini Kári P. Højgaard sær stórar møguleikar í at virka, sum royndarøki. Men hann heldur, at ikki at tað er neyðugt bert at satsa uppá at verða royndarøki innan kunningartøkni. Hetta kunnu vit gera innan nógvar ymiskar vinnir, sigur Kári P. Højgaard.

Olav Enomoto heldur somuleiðis arbeiðið hjá Bitland vera sera áhugavert, men sigur, at Bitland er eitt spinkult projekt, við sera avmarkaðari fíggjarorku. Landstýrismaðurin í vinnumálum Bjarni Djurholm, sigur seg stuðla arbeiðinum hjá Bitlandi, og vinnumálaráðið hevur bæði givið uppbakkning og verið innið sum aktørur í arbeiðinum . Hann heldur, hetta arbeiðið vera serliga áhugavert, tí tað skapar verkætlanir, ið annars ikki vórðu gjørdar.